# Guðrið stjóri á ílegusavni



Guðrið Andorsdóttir nýggjur stjóri á Ílegusavninum

Landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur avgjørt at seta Guðrið Andorsdóttir í starv sum nýggjur stjóri á Ílegusavninum.

Guðrið Andorsdóttir er 52 ára gomul og útbúgvin cand. scient. frá Universitetinum í Oslo.

Guðrið hevur drúgvar starvsroyndir sum leiðari á góðskudeildini hjá Faroe Seafood og Fiskavirking tey seinastu 17 árini. Hon hevur harumframt 5 ára royndir frá granskingarstarvi í Noregi og Føroyum. Somuleiðis hevur Guðrið sitið í Granskingarráðnum í 10 ár og er stýrislimur í Vinnuframagrunninum.

Guðrið Andorsdóttir byrjar í starvinum sum stjóri á Ílegusavninum tann 1. mars.

## Veðurlagið hóttir ferðavinnuna



Amerikanski staturin Alaska er eitt sera væl umtókt ferðamál. Á hvørjum ári koma fleiri túsund fremmandafólk hagar at hyggja at teimum høgu fjøllunum við teimum stóru og vøktu jøklunum. Men náttúran er ikki, sum hon hevur verið.

Veðurlagsbroytingarnar tey seinnu árini hava gjørt, at fleiri av teimum gomlu ferðaleiðunum eru ruddar burtur við skriðulopum, og aðrar standa undir vatni. Lendi, sum fyrr var bert og oyðið, er nú runnavaksið, og har eru fleiri plantur, sum eingin hevur sæð áður. Djórini, sum plagdu at halda til uppi við jøklarnar, eru farin haðani.

Hetta er ein partur av einari nýggjari frágreiðing, sum amerikonsku umhvørvismyndugleikarnir hava skrivað um viðurskiftini í Alaska. Í niðurstøðuni stendur millum annað, at veðurlagsbroytingarnar fara at hava vífevndar avleiðingar fyri ferðavinnuna í Alaska og fyri statin sum heild.

# Kaj Leo er Pál-fan

**SVIMJING Landins hægsti hitti landsins besta í svimjihylinum í Gundadali í Havn sunnudagin, tá Kaj Leo Johannessen, sum er í hylinum hvønn morgun, fekk eitt prát við føroyska svimjikongin, Pál Joensen**

Jan Müller



*Landsins hægsti hitti landsins besta í svimjihylinum í Gundadali sunnudagin. Mynd Jan Müller*

Eitt av Føroya frægastu ítróttarfólkum á altjóða palli, svimjarin Pál Joensen úr Vági, hevur alt Føroya fólk aftan fyri seg, tá hann luttekur í altjóða kappingum. Millum hansara viðhaldsfólk telist eisini ein annar frægur svimjari, nevniliga Føroya løgmaður, Kaj Leo Johannessen. Og tað hendir seg meira enn so, at teir báðir hittast í hylinum, um ikki til dyst so til prát millum longu distansurnar hjá Páli. So var eisini henda sunnudagin, tá Pál fekk ein bana fyri seg í vanligu svimjitíðini. Mong vórðu tey, sum eygleiddu henda fima svimjara, ið hevur sett Føroyar á landakortið eins væl og okkara fótbóltslandslið hevur gjørt tað. Og løgmaður dylur ikki fyri, við einum skálkabrosi, at eisini hann hevur nakað at læra av Páli at brúka í sínum politiska arbeiði til frama fyri Føroyar, nevniliga at hava orkuna og viljan til at megna teir longu teinarnar.

– Eg eri Pál fan um ein háls var fyrsta viðmerkingin, sum Sosialurin, ið eisini hevði fólk í hylinum henda dagin, fekk frá ongum minni enn sjálvum løgmanni. Kaj Leo Johannesen vil ikki avdúka, um hann roynir at læra kynstrið frá Páli at klára tær longu distansurnar, teinarnar, nú tað stundar til løgtingsval eisini. Eitt val og annað og ein dystur og annar. Pál venur til fleiri spennandi kappingar í summar, men venjingin hevur serstakliga eina kapping fyri eygað, og tað er HM í svimjing í Sjangkai í heyst.

– Eg fari at gera mítt besta, og venjingin skal ikki liggja eftir, sigur hesin smílandi og fryntligu vágbingurin. Eisini skal hann til at venja til OL í London næsta ár. So her er ovmikið at venja til, og tá koma nøkur góð orð frá løgmanni heldur ikki so illa við.

– Eg havi sagt Páli, at eg havi so stóra virðing fyri honum bæði sum ítróttarmanni og ikki minst sum rollumodell hjá teimum ungu. Hetta er nakað, vit ikki mugu undirmeta, sigur løgmaður, sum als einki hevur ímóti at geva pláss fyri Føroya besta svimjara í høllini í Gundadali ein sunnudag, tá eisini løgmaður er úti í tí váta elementinum.

Um teir báðir eisini tosaðu um 50 metra svimjihylin, ið er dreymaynskið hjá vágbinginum, sigur søgan einki um.

jan@sosialurin.fo

# 30 nýggir Maersk risar

**FRAMSÝNING AP Møller Mærsk hevur júst kunngjørt bílegging av upp til 30 risastórum bingjuskipum fyri íalt 30 milliardir krónur frá Daewoo skipasmiðjuni í Suðurkorea**



Nýggju skipini minka $CO_2$ útlátið við 50% í mun til tey verandi og verða tryggjað móti sjóræningum.

Business-Line skrivar, at danska reiðaríið A P. Møller - Maersk hevði bílagt 10 risastór bingjuskip frá skipasmiðju í Suðurkorea, við møguleika fyri bygging av 10 skipum aftrat teimum fyrstu 10.

Á tíðindafundi í London mánadagin kom fram, at Maersk hevur tryggjað sær møguleika fyri bygging av 20 risaskipum aftrat teimum fyrstu 10 skipunum. Tey fyrstu 10 skipini skulu handast Maersk í 2014.

Nýggju skipini skulu hjálpa Maersk at minka um høgu orkuútreiðslurnar. Tey verða nógv bíligari í oljurakstri og meira umhvørvisvinarlig, enn verandi flotin hjá Maersk.

Skipini verða útgjørd við eini hita-endurnýtsluskipan, ið ger, at tey minka $CO_2$ útlátið við 50%, í mun til verandi skipini á rutuni millum Asia og Evropa, upplýsir Suðurkoranska Skipasmiðjan, ið skal standa fyri byggingini av heimsins størstu bingjuskipum til eitt av heimsins størstu reiðaríum, danska A. P. Møller Mærsk.